## Kannaðu skeinkjustøð

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Leygarmorgunin gjørdi Brunaumsjón Landsins saman við politinum í Havn kanningar á skeinkjustøðunum í Havn.

Tá slíkar kanningar verða gjørdar, verður kannað um viðurskiftini eru í lagi. Tað verið seg, hvussu nógv fólk eru inni, um eldsløkkjarar og neyðdyr eru í lagi og so framvegis.

Frá politistøðini í Havn verður sagt, at onki var galið nakrastaðni.

Annars hevur vikuskiftið verið stak friðarligt. Eitt lítið ferðsluóhapp var sunnukvøldið á Grønlandsvegnum/-Svalbardsvegurin, har tveir bilar rendu saman. Tað vísti seg, at annar bilførarin var ávirkaður av rúsdrekka.

Politistøðin á G!:

## Fyrimyndarligur festivalur

**Politiið í Runavík letur stak væl at vikuskiftinum. Lítið og onki hevur verið hjá teimum at gera, og teir tosa um fyrimyndarligar festivalluttakarar**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Í sambandi við G! festivalin setti politiið í Runavík eina lokala politistøð upp í Syðrugøtu. Men teir lata stak væl at vikuskiftinum, tí fólk hava uppført seg fyrimyndarligt.

Trý fólk vórðu handtikin fyri at hava euforiserandi evni uppiá sær, og leygarnáttina vórðu tveir bilførarar tiknir fyri at koyra við kenning.

Vakthavandi á politistøðini í Runavík sigur, at teir hava verið í hóslag við eini sjey fólk í sambandi við fyllskap. Tann eini varð koyrdur til Havnar at sova rúsin av sær.

Politiið hevði mannað seg væl í sambandi við G! festivalin, og samanumtikið lata teir væl at stóra tónleikafestivalinum.



*Frá vinstru Petur í Túni og Marner Joensen aftanfyri nakrar av vørunum teir virka til føroyska heimamarknaðin á aldargomlu steinunum í Víkahandlinum í Oyndarfirði. Í baksýni sethúsini hjá Clement Høgnesen, keypmanni, sum setti Víkahandilin á stovn í 1856. Hann andaðist í 1916 sum fátækur maður*
*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

# Leskiligir bitar frá Sonni Fiskakeyp

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Hellurnar, Sosialurin:** Eitt gamalt orðatak sigur, at vatn kemur aftur, har vatn hevur runnið, og hendan myndin kann eisini nýtast til lítlu fyritøkuna Sonni Fiskakeyp, sum heldur til í leigaðum hølum í fiskahúsinum hjá P/F Nósa í Oyndarfirði. Hetta húsið stendur á grundini á gamla handlinum í Víkum, sum brendi fyrst í sjeytiárunum.

Í dag virkar Sonni Fiskakeyp vørur til føroyska marknaðin. Tað vil siga heilt vanligar vørur sum ræstan fisk, lippur, kjálkar, fesk fløk, kalva og annars alt sum kundin ynskir. Í 1856 fór Clement Høgnesen undir handil í Víkum og tá var marknaðurin útlendskur. Í Oyndarfirði varð fyrsta flokks klippfiskur tilvirkaður til marknaðirnar í Miðalhavslondunum, í dag verður fiskur virkaður til foroyingar og til kræsna marknaðin her heima.

– Vit hava ein høvuðssetning, og hann er at okkara vørur liva upp til øll krøv um frískleika, rætta hagreiðing og rætta merking og rættan pakning, sum lógin ásetir. Tað hevur stóran týdning fyri okkum, at kundin fær ta vøru hann ynskir, og í tí standi hann ynskir, sigur Marner Sonni Joensen, stjóri á fyritøkuni. Hann er føddur ein sunnudag, og eitur tí Sonni til millumnavn, og tað er júst hetta navnið, sum hevur lagt navn til fyritøkuna.

Talan er um delikatessur ella leskiligar bita ella lystimeti. Tú sær tað beinanvegin tú kemur inn á nossliga virkið. Har standa ein rúgva av spannum við lippum og kjálkum í laka. Lakin er krystallklárur og lippurnar liggja hvítar og friskar og drekka salt í seg. Aftur við mjólkasós er hetta satt lystimeti og í dag høgtíðsdøgurði hjá mongum.

Frysta vøran er eisini leskilig, har hon liggur einkult fyrst í pakningi.

– Vit lata ikki okkara frystu vøru í blokki. Vit vita, at hetta er meira tíðarkrevjandi, men tað er ein fyrimunur fyri kundan. Keypa fólk eina eskju, so kunnu tey taka júst so nógv teimum tørvar burtur úr henni, meðan hon enn liggur í boksini. Blokkurin krevur at tú tinar allan pakkan ella sagar fiskin sundur, sigur Marner Joensen.

### Ræstur fiskur

Inni í Fyllshamarsvíkini, beint innanfyri virkið stendur ein hjallur.

Hann verður nýttur til at ræsa fisk í. Akkurát nú er hann tómur. Hann stendur bara har reinur og nossligur.

– Vit ræsa ikki hesa tíðina á árinum, vit ræsa bara vetrahálvuna, ella í teimum mánunum, har bókstavurin r er í. Vit halda, at ræstur fiskur er betri, tá kuldi eisini er í luftini, sigur Petur í Túni, sum hevur tað dagligu hagreiðingina av fiskinum um hendi. Hann er toftamaður, sonur Júst í Túni, sála, og tað merkir, at hann er ikki bangin fyri at royna nakað nýtt.

Umframt at hagreiða fisk, so koyrir hann fisk kring landið.

– Vit lata fisk til dyrnar, tá fólk hava biðið frá okkum, og við hesi tænastu koma vit nógv tættari at viðskiftafólkunum, sigur Petur í Túni.

– Hugskotið við okkara fyritøku er at kunna veita eina tænastu, har alt er á einum stað. Tað merkir, at tú á einum stað skal kunna bíleggja tað sum er úr sjónum við fyrsta flokks góðsku, sigur Marner Joensen, sum saman við Petur er dagliga drívmegin aftanfyri virkið. Marner er eisini stjóri á fyritøkuni Sonni Seafood, sum keypir fisk á Fiskamarknaði Føroya til útflutnings.

### Heimasíðan ein sýnisgluggi

Fyritøkan er eisini á alnótini. Tað er triðji eigarin í fyritøkuni, Martin Joensen, kanska meira kendur frá tónleikalívinum, sum stendur fyri hesum partinum av virkseminum hjá virkinum.

– Okkara heimasíða www.fiskakeyp.fo er ein sýnisgluggi, har brúkarin hevur møguleika at fara inn og hyggja eftir hvat vit hava at bjóða og beinleiðis at umbiðja vørur. Vit hava eisini fingið nógvar áheitanir viðvíkjandi fiskauppskriftum. Fólk kunnu senda inn teirra bestu og lesa hjá øðrum. Ongin uppskrift kemur á heimasíðuna, uttan at vit hava sjálvir roynt hana áðrenn, sigur Marner Joensen.



# Opið neyst hjá Klaksvíkar Róðarfelag

**Rættiliga fitt av fólki høvdu leitað sær oman í hølini hjá Klaksvíkar Róðrarfelag seinnapartin leygardagin, tá felagið hevði opið hús við hópin av tiltøkum á skránni. Fyrireikarnir vóru sera væl nøgdir við tiltakið, sum eisini gav fitt av peningi til felagið**

KLAKSVÍK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Meðan summi royndu seg sum røtt kappróðrarfólk á Vánni, valdu onnur atsessast við árarnar inni á neystaloftinum. Kappingin var sera hørð í løtum*

Okkurt bendir á, at kappróðurin í Klaksvík veruliga er farin at hála seg inn hina ítróttina í bygdini. Serliga eru tað børnini og tey ungu, sum av álvara eru farin at síggjast aftur í felagnum, bæði tá tað ræður um kappingarnar á stevnunum og í virkseminum í húsinum hjá felagnum annars. Sum kunnugt, er skipaður barnaróður eitt lutfallsliga nýtt fyribrigdi í Føroyum, og børnini stóðu eisini ovast á skránni á tiltakinum hjá Róðrarfelagnum leygardagin. Har fingu eisini børn, ið vanliga ikki rógva, høvi at royna seg sum røtt kappróðrarfólk við einum royndum róðursmanni í bátinum, og røðin var lang at sleppa framat.

### Familjuútferð

Frá fyrireikarnum frætta vit, at tiltakið kanska einamest var fyri at geva foreldrum møguleika at síggja, hvar tað er, børnini eru farin at halda til ein stóran part av frítíðini. Og tað var líkt til, at nógv mest sum høvdu gjørt sær hetta til eina familjuútferð, tí okkurt var fyri øll og stóra neystið var stúgvandi fult av fólki líka frá byrjan. Í sjálvum neystinum var tombola á skránni, meðan ovasta hæddin hendan dagin var karmur um kappingar í rógvimaskinum og vektlyfting. Høvi var eisini at fara ein stimitúr við speedbáti á Vánni ella bara ganga innadura og hyggja at myndaframsýning, har tú kundi fylgja søguni hjá felagnum heilt frá byrjan.

### Vend komin í

Í Klaksvíkar Róðarfelag fegnast tey um, at Róðarsamband Føroya í fjør tók stig til at gera barnaróðurin til fastan tátt í kappingarárinum. Talið á maningum, sum meldaðu til kappróðrarnar, hevði tá verið lækkandi í fleiri ár, og ofta var trupult at halda lív í felagnum uttanfyri sjálvt kappingarárið. Og so leingi nýggjar manningar ikki løgdust til, vóru sjálvsagt vánalig útlit fyri, at vend fór at koma í. Men nú hevur felagið ikki minni enn 3 barnamanningar og umframt at venja dúliga, eru børnini nógv at síggja í húsinum hjá felagnum. Hvør manning hevur lykil til húsið, sum tey kunnu brúka, tá tey hava hug, bara tey fara væl um.

### Framtíðin í góðum hondum

Fyrr í ár sá annars eitt skifti út til, at limirnir í Klaksvíkar Róðarfelag fóru at gerast húsvillir, av tí at ætlanir eru um at byggja eina handilsmiðstøð, har neystið nú stendur. Ætlaninar um handilsmiðstøðina eru framvegis ikki sleptar, men Klaksvíkar Róðrafeag hevur fingið játtan frá býráðnum um, at gamla neystið verður standandi, so leingi, sum til ber. Síðani er ætlanin at byggja nýtt neyst í samband við handilsmiðstøðina, so í løtuni bendir alt á, at framtíðin hjá felagnum í allar mátar er í góðum hondum.



*Eisini fingu gestirnir møguleika at royna eydnuna í tombola básinum hjá Klaksvíkar Róðrafelag*

NETBANKIN
Útisetar

Við Netbankanum kanst tú sum útiseti framhaldandi røkja øll vanlig peningaviðurskifti ígjøgnum Føroya Banka, haraftrat ber til at hava samskifti við tín kundaráðgeva um teldupost.

Endamálið við Netbankanum er at gera tað lættari hjá tær at avgreiða tíni fíggjarviðurskifti.



**Gjaldskort**
Hevur tú gjaldskort FR-kort ella FR/Visa kort kann SU flytast beinleiðis inn á tína vanliga nýtslukonto í Føroya Banka, so tað er ikki neyðugt hjá tær at stovna konto í donskum peningastovni

**Nýtslumøguleikar**
- Kanna saldo
- Fáa yvirlit yvir bókingar, sum eru gjørdar á konto
- Flyta pening á konto í føroyskum, donskum ella grønlendskum peningastovnum
- Gjalda FI-kort, og melda gjøld til V&T og BS
- Stovna fastar flytingar til konto í føroyskum, donskum og grønlendskum peningastovnum
- Fáa yvirlit yvir bókingar, sum verða gjørdar
- Hava samskifti við kundaráðgevan um teldupost
- Senda lániumsókn

www.netbankin.fo
FØROYA BANKI